

*Hvussu politiska samansetingin verður, veldst nógv um, hvønn politikk flokkarnir hava at standa saman um. Her haltar nógv í løtuni, tí hvør er kósin fyri Føroyar, ið ein samgongumeiriluti kann semjast um?*

MYND: JENS KRISTIAN VANG

eldraøkinum verða framdir. Ongin ivi er um, at hann her meinti við minnilutar í Fólkaflokkinum, og tá løgmaður nevndi hetta í Tinganesi mikumorgunin, stóð serliga ein maður og smíltist. Tað var Poul Michelsen. Hann var jú tann, sum fyrstur nevndi, at Fólkaflokkurin var læstur fastur í blokeringum.

Í Sosialinum í oktober í fjør grundgav Poul Michelsen fyri, hví hann ikki longur kundi vera partur av Fólkaflokkinum. Hann segði tá soleiðis: »Sjúkan í flokkinum er, at fleiri ynskja radikalar broytingar, og at nakrir so halda ímóti. Spyrt tú meg, hvat Fólkaflokkurin er samdur um, so síggi eg onga semju um nakað. Hann kann ikki semjast um fiskivinnureform, ikki um burðardygd, ikki um umhvørvismál, ikki um kommunalreform, sum landsstýrisfólk hjá flokkinum hava slóðað fyri á dugnaligan hátt, ikki um skúlareformin, ikki um stjórnarskipanina, ikki um tjóðskaparmál og heldur ikki um búskaparmál. Eg dugdi bara ikki at síggja, at hetta var vert at vera partur av.«

Hetta var eftir øllum at døma tað, sum Kaj Leo Johannesen eisini hevði fingið nóg mikið av, og tá Aksel Johannesen ikki vildi finna seg í, at Fólkaflokkurin førdi sín egna fíggjarpolitikk, og tilfeingisgjaldið var um at gerast veruleiki, mátti Fólkaflokkurin enda uttanfyri. Har situr hann so nú og grundar yvir, um hann gjørdi tað rætti. Men sama um blokerandi minnilutarnir í Fólkaflokkinum eru horvnir úr samgonguni, er politiska støðan ógvuliga ógreið, tí í fyrsta lagi gevur tað lítla meining at skipa nýggja samgongu í einum valári, í øðrum lagi siga allir andstøðuflokkarnir seg vera ímóti verandi fíggjarkørmum, og í triðja lagi tykjast nógv hálovaðu reformarnir at vera sera óítøkiligir.

Nú Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin leita eftir eini meining við at halda fram sum minnilutasamgonga, og andstøðuflokkarnir síggja sær ein møguleika at fáa ávirkan, er tann stóri spurningurin, hvønn politikk allir hesir flokkarnir hava at standa saman um. Teir kunnu skjótt semjast um at avgreiða makrelbýtið, so skipini sleppa til fiskiskap. Men Kaj Leo Johannesen, sum nú hevur yvirtikið Fiskimálaráðið og skal lýsa kunngerðina, ið Jacob Vestergaard skuldi lýsa, hevur havt fleiri fyrivarnir um tilfeingisgjaldið. Lýsir hann bara kunngerðina? Ella fer hann at seta tilfeingisgjaldið í verk saman við Javnaðarflokkinum og andstøðuni og so útskriva val í september?

## Fløkt mál í undantaksstøðu

Onnur mál, sum hava verið nevnd sum samstarvsmál millum minnilutasamgonguna og andstøðuna, eru nógv umrøddi kommunalreformurin og pensjónsreformurin. Men kunnu tílík mál loysast úr lagdi í politiskari undantaksstøðu í einum valári? Pensjónsreformin er ikki semja um í løgtinginum, og ivamálini í honum eru so mong, at mest sannlíkt er, at málið bíðar til eftir valið. Kommunalreformurin er sambært Høgna Hoydal, formanni í Tjóðveldi, eitt so fløkt mál, at ein rúgva av fylgilógum skal samtykkjast aftrat tílíkari nýskipan. Hetta nevndi hann í sjónvarpinum mikukvøldið. Er sannlíkt, at eitt tílíkt mál kann fremjast í politiskari undantaksstøðu í einum valári? Neyvan.

Mest sannlíkt er, at lítið og onki av týdningi fæst frá hondini undir verandi politisku umstøðum, og tí munnu politisku flokkarnir vera farnir at umhugsa, hvussu ein landsstýrissamgonga skal setast saman eftir løgtingsvalið, um valið so verður í juni, september ella januar. Hvussu politiska samansetingin verður, veldst nógv um, hvønn politikk flokkarnir hava at standa saman um. Her haltar nógv í løtuni, tí hvør er kósin fyri Føroyar, ið ein samgongumeiriluti kann semjast um? Eina ferð kallaðist eitt landsstýri yvirtøkulandsstýrið, og eitt annað landsstýri kallaðist fullveldislandsstýrið. Fáa vit nú eitt nýskipanarlandsstýri, ið fer at fremja teir reformar, sum hava verið blokeraðir so leingi?

Okkurt kundi bent á hetta, og um so verður, fer eitt nýskipanarlandsstýri kanska at hava í huga gamla orðatakið um, at frá høvdinum skalt tú hvalin skera. Stjórnarskipanarlógin verður tí endaliga avgreidd og samtykt eftir føroyskum leisti og ikki samsvarandi donskum kravboðum. Kommunalreformurin verður framdur, so landið verður býtt í 7-9 kommunur. Fiskivinnureformurin verður framdur soleiðis, at kvotur og fiskidagar verða seld í tilfeingisbúð. Skúlareformurin fer at hava við sær, at skúlaeindirnar verða størri og sterkari, pensjónsnýskipanin verður framd, og kanska verður ein búskapargrunnur eisini stovnaður at goyma serligar inntøkur í at javna sveiggj við.